# Frá Anders And til heimsbókmentir



*Maluni Marnersdóttir dámar ómetaliga væl at lesa. Hon lesur øll sløg av bókmentum og úr øllum heraðshornum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**-Sum kvinna í akademiska heiminum eru ávis ting, tú skalt tola. Tú verður noydd at stríðast eyka fyri at vinna virðing. Eg veit millum annað frá mær sjálvari, at fleiri hava dyggiliga speirikið mítt vísindaliga arbeiði, sigur Malan Marnersdóttir, rektari á Fróðskaparsetri Føroya, sum mikudagin verður tilnevnd professari**

NÝGGJUR PROFESSARI
*Páll Holm Johannesen, pall@sosialurin.fo*

Tá ið Malan Marnersdóttir sum smágenta trúliga blaðaði í Anders And bløðum, hugsaði hon neyvan um, at hon skuldi enda sum professari á lærda háskúlanum í Føroyum.

Men mikudagin verður hon alment tilnevnd til professara á Fróðskaparsetri Føroya, eftir at hon hevur starvast har í fleiri enn 20 ár. 52 ára Malan Marnersdóttir er við at røkka tindinum.

Hon er kvinna í einum vísindaheimi, har menn eru í meiriluta, hon er ógvuliga arbeiðssom og framsøkin, og í hálvt sætta á hevur hon starvast sum rektari á Fróðskaparsetrinum.

## Framsøkin

Úr øðrum real í Studentaskúla. Matematiskt studentsprógv 1971. Cand Mag í norðurlendskum og fronskum 1979. Undirvísingarroyndir í Hoydølum og á Johann Wolfgang Goethe Universitetinum í Frankfurt. Adjunktur, lektari og seinni rektari á Fróðskaparsetrinum. Frá komandi mikudegnum kann hon kalla seg fyri professara á setrinum.

Orðið framsøkin tykist lýsa 52 ára gomlu Maluna Marnersdóttir væl.

-Orðið framsøkin hevur ofta eina negativa merking, men jú tú kanst kalla meg framsøkna. Eg havi altíð roynt at arbeiða miðvíst ímóti góðum úrslitum. At vera framsøkin er bæði spennandi og avbjóðandi. Tað er altíð gott at seta sær nøkur mál og vita, um tú røkkir málinum, greiðir hon frá.

## Elskar at lesa

Lesnaður hevur frá barnsbeini hugtikið Maluna Marnersdóttir. Sum smágenta las hon trúliga Anders And. Við tíðini er lesnaðurin blivin tyngri, og tað mugu verða fáar heimsbókmentir, ið hon ikki hevur kagað í.

-Eg lesi allar møguligar bókmentir og úr øllum herðashornum. Eg lesi eisini bæði føroysk og donsk bløð. Eg fylgi við í tíðindum, men eg hvørki hyggi ella lurti eftir hvørjari tíðindasending. Mær dámar væl at hyggja at mentanarreportasjum og ganga til sjónleik, greiðir Malan Marnersdóttir frá. Tá hon er stødd uttanlands nýtir hon høvið til at ganga á ymiskum listasøvnum, og hóast hon sigur seg ikki hava skil fyri tónleiki, dámar hon væl at ganga til operu.

## Akademiski heimurin

Í 1983 flutti Malan heim aftur til Føroya at arbeiða á Fróðskaparsetri Føroya. Tá vóru bert tvær føroyskar kvinnur, ið vóru í vísindaligum starvi. Hóast menn framvegis eru í meiriluta, hvat vísindaligum størvum viðvíkur, leggjast alsamt fleiri kvinnur afturat-bæði úti í heimi og í Føroyum.

Hetta rák fegnast rektarin á Fróðskaparsetri Føroya um.

-Sum kvinna í akademiska heiminum eru ávis ting, tú skalt tola. Tú verður noydd at stríðast eyka fyri at vinna virðing. Eg veit millum annað frá mær sjálvari, at fleiri hava dyggiliga speirikið mítt vísindaliga arbeiði, vísir Malan á.

Granskingin hjá Maluni kemur ikki undir "hørðu" vísindaligu greinarnar sum náttúruvísindi og tøknifrøði, men heldur hevur Malan granska í hugvísindafrøði, tvs. bókmentir.

Malan greiðir frá, at virðingin fyri akademikarum í Føroyum er munandi økt seinnu árini.

-Tá eg var ung, kundi tú ikki heilt óskammaður siga, at tú vart akademikari. Hugburðurin var, at akademikarar hildu seg vita betur enn onnur, og tað varð ikki væl dámt. Hesin hugburður er ikki í dag millum føroyingar, sigur rektarin á Fróðskaparsetri Føroya.

-Eg minnist væl í áttatiárunum, tá vit gjørdu av at seta Magistarafelagið á stovn. Vit royndu at fara varisliga fram. Eg minnist eisini, at vit hugsaðu nógv um, hvat onnur fóru at halda um okkum. Nógv er broytt síðan, og í dag er tað meira vanligt at vera akademikari, fortelur Malan Marnersdóttir.

## Føroyskar bókmentir

Fólk innan føroyska bókmentaheimin fýlast javnan á, at alt ov fáar føroyskar skaldsøgur koma út. Í 2000 vardi Malan Marnersdótti doktararitgerð um nútíðar føroyskar skaldsøgur, og hon er als ikki samd í teimum atfinningunum.

-Fyrsta føroyska skaldsøgan varð givin út í 1909, og fram til 1999 komu í alt einar 100 skaldsøgur út. Hugsar tú um fólkatalið í Føroyum, haldi eg ikki, at støðan er so ring, sigur hon.

Spurd, hvussu dygdin er á føroyskum skaldsøgum sammett við onnur lond, svarar hon, at støðan í Føroyum minnir nógv um aðrastaðni.

-Vit hava fleiri góðar skaldsøgur, onkrar eru rættiliga góðar, meðan aðrar eru minni góðar. Norðurlandahúsið skipar fyri eini skaldsøgukapping í summar, og heili 28 handrit eru komin inn. Tað verður ógvuliga spennandi at lesa, hvussu góðskan verður á teimum handritunum, greiðir Malan Marnersdóttir frá.

*Hvørjir eru okkara fremstu rithøvundar í løtuni?*

Mær dámdi ómetaliga væl bókina Rúm hjá Carl Johan Jensen. Hann er ein ógvuliga spennandi rithøvundur, og eg gleði meg til hansara næsta verk. Marjun Kjelnes hevur eisini nakað gott í sær, og hon kann eisini menna seg til ein rættiliga dugnaligan rithøvund. Mær dámar eisini væl Tórodd Poulsen, hóast hann svingar eitt sindur, svarar Malan Marnersdóttir.

## Næsta mál

Mikudagin verður Malan Marnersdóttir alment tilnevnd proffessari á Fróðskaparsetri Føroya. Alt lívið hevur hon verið framsøkin, og altíð hevur hon leitað eftir nýggjum avbjóðingum. Ein átrokandi spurningur er tí, hvørji mál eru næst á dagskránni hjá Maluni Marnersdóttir?

-Dóttir mín spurdi meg nú ein dagin sama spurning. Eg skal nú fyrst og fremst royna meg sum professara. Tað arbeiðið inniheldur fleiri nýggj øki, sum eg eri noydd at tillaga meg til. Uppgávan verður at røkja tað arbeiðið so gott sum yvirhøvur gjørligt. Eftir tað er tíðin kanska komin til at verða fyrrverandi..., svarar Malan Marnersdóttir skemtandi at enda..

### FAKTA

| | |
|---|---|
| **Navn:** | Malan Marnersdóttir |
| **Fødd:** | 25. januar 1952 í Klaksvík |
| **Foreldur:** | Marner og Anna Simonsen |
| **Bústaður:** | Tórshavn |
| **Útbúgving:** | Cand Mag í Norðurlendskum og fronskum 1979, Licentiat ritgerð 1986, Dr. phil í 2000. Professari frá 2004 |
| **Starvsroyndir:** | Undirvíst í Hoydølum 1979-81 og Johan Wolfgang Goethe Universitetinum í Frankfurt 1981-83. Adjunktur 1983-86, lektari 1986-apríl 2004, og seinni rektari á Fróðskaparsetri Føroya 1998-. |



# Nýtt kór í Vágum

**Sunnudagin verður konsert í auluni á Giljanesi, har eitt nýtt kór fer at framføra fyri fyrstu ferð. Talan er um Vága Gentukór**

KONSERT
*Edvard Joensen*



*Vága Gentukór avmyndað undir venjing á Giljanesi. Gentukórið hevur sína fyrstu framførslu sunnudagin klokkan 17.00 í auluni á Giljanei*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:** Vaknaður er vársins songur, og við honum er eisini sprottið nýtt kór á framman undan blómandi trænum, við føroyskum kórum. Vága Gentukór fer at hava sína fyrstu almennu framførslu á Giljanesi sunnudagin. Leiðari er Ólavur Hátun.

Vága Gentukór fer at hava tvær konsertir saman við Vágakórinum. Tann fyrra verður í skúlaauluni á Giljanesi sunnudagin klokkan 17.00, og tann seinna verður í Kommunuskúlahøllini í Havn mánakvøldið klokkan 20.00.

Limirnir í gentukórinum eru gentur úr fjórða flokki og eldri í Sørvágs og Miðvágs- Sandavágs Skúlum. Genturnar hava við vælvild frá skúlunum vant nakrar ferðir í vetur í sonevndum longdum fríkorterum, eins og tær eisini hava havt nakrar veruliga kórvenjingar saman, greiðir Ólavur Hátún, kórleiðari, frá.

Ólavur Hátun heldur, at tað er framtíð í einum gentukóri í Vágum, og hann væntar enn dyggari undirtøku komandi vetur, sigur hann. Og so leggur hann skemtandi afturat, at tað kortini er mest at sammeta við gamlar knur, sum keypa sær pappageyk fyri at vit, hvussu gamal hann kann gerast, at hann, ein gamal maður, fer at tosa um framtíðarútlit hjá hesum ungu kórsangarum.

Men tað skilst á Ólavi, at hann hevur ikki mist hugin til kórsang enn. Minni enn so. Hann tosar um komandi vetur, sum var hann longu byrjaður, hóast tað valla er farið at grógva í haganum enn.

Saman við Vága Gentukóri fer eisini Vágakórið at hava konsert sunnudagin. Eisini har er Ólavur Hátún kórleiðari.

Vágakórið fer at framføra eldri og yngri føroyskar sangir saman við sangum á bæði týskum og enskum máli, sigur Ólavur. Og av tí, at konsertirnar eru um ta tíðina, norðmenn halda sín tjóðardag, verður eisini ein heilsa til teirra at hoyra á konsertini.

Vágakórið hevur havt ein virknan vetur, greiðir Ólavur Hátún frá. Almennu framførslurnar byrjaðu, sum siður er, í Miðvágs Kirkju fyrsta sunnudag í advent. Jólakonsertir vóru í Sørvág- og Sandavágs kirkjum, og jólaløta varð hildin í Bíggjar Kirkju. Kvøldseta var á Giljanesi í februar, og í Miðvág Kirkju varð saman við Ingu Poulsen Dam, presti, skipað fyri sangløtu, har sungnir vórðu sálmar, sum Dávid Johannesen, sóknarprestur í Vágum, hevur yrkt.

# Føroyskt mál ørkymlar næmingar

**Fleiri næmingar og lærarar í framhaldsdeildini kæra seg um, at tey skiltu ikki øll orðini, sum nýtt vórðu í uppgávunum, tá næmingar vóru til roynd í greiðslurokning í vikuni**

ROYND
*Edvard Joensen*



*Næmingar í framhaldsdeildini, sum hava veri til roynd í vikuni, siga seg vera ørkymlaðar av, at orð, sum tey ikki skilja, koma fyri í rokniuppgávunum*

Bæði næmingar og lærarar í framhaldsdeildini í fólkaskúlanum hava kært seg um, at tey hava havt trupulleikar av at skilja øll orðini, sum brúkt vórðu í uppgávunum, sum næmingarnir fingu til royndina í greiðslurokning, sum var hildin í skúlunum kring landið mánadagin. Úr Mentamálráðnum verður sagt, at orðini eru øll at finna í lærubókunum, sum brúktar hava verið síðan 1993.

Tá næmingarnir mánadagin sórtu við royndarborðini, kom orðið »farmynd« fyri í onkrari uppgávu. Fleiri teirra, sum skuldu loysa uppgávuna, kendu als ikki hetta orðið, og fingu trupulleikar av hesum. Fólk gjørdust ótrygg, og onkur royndi at gita seg fram til hvat hetta kundi merkja. Tað kann so í ringasta føri elva til, at næmingurin ikki hevur loyst uppgávuna rætt við teirri avleiðing, at hann missir stig í dømingini av uppgávuni. Og hóast onkrir næmingar høvdu orðalista við, funnu teir ikki orðið »farmynd« í hesum listanum.

Eisini onkrir lærarar hava kært seg um, at slíkt orðalag, sum ikki øll skilja, verður brúkt í slíkum førum. Betri hevði verið, heldur onkur lærari, at brúkt tey altjóða orðini, sum vanlig hava verið fyrr, heldur enn slík serføroysk orð, sum fólk ikki kenna, tí tey ikki dagliga verða nýtt.

Ein lærari, Sosialurin hevur tosað við, sigur, at honum er greitt frá aftan á royndina mánadagin, at orðið merkir »diagram«, sum vanligt annars hevur verið brúkt í lærugrein sum rokning/støddfrøði.

Móðurmálsorðabókin hevur orðið, men har verður tað lýst við danska orðinum »kurve«, sum hesin lærarin ikki heldur vera tað sama sum »diagram«.

Tað er ein bólkur undir Mentamálaráðnum, sum ger uppgávurnar til hesar royndirnar.

Í hesum bólkinum sita fólk, sum hava royndir við undirvísing í fakinum, eins og fólk, sum hava skrivað bøkur til undirvísingarbrúk, sigur Janus Jensen á Mentamálaráðnum.

Hann undrast eitt sindur á, at tað skal koma fyri, at fólk ikki kenna orðini, sum brúkt verða. Í hesum serstaka førinum orðið »farmynd«. Tí tað stendur í bókunum, sum brúktar hava verið í undirvísingini síðan 1993, vísir hann á.

Hann sigur eisini, at abeitt verður í løtuni við einum orðalista, sum skal fáa júst slíkar misskiljingar av vegnum.

Uppgávurnar verða allar dømdar í felag, tá royndin er liðug. Tað eru eisini roynd fólk, sum gera tað, sigur Janus Jensen.

Um tað so vísir seg, at ein afturvendandi trupulleiki er at síggja í uppgávunum, sum latnar eru inn, verður sjálvandi hugt at, hvørjum hann kann stava frá. Eitt nú einum orðið, sum fólk ikki hava skilt. Og so verður støða tikin hareftir, sigur hann.